# Fyribyrgingarráðið

## Skrivari til Fyribyrgingarráðið

Søkt verður eftir einum fólki at starvast fulla tíð hjá Fyribyrgingarráðunum at byrja skjótast gjørligt.

**Um starvið:**
Tann, sum verður settur, skal starvast á skrivstovu ráðsins og hava dagliga raksturin av skrivstovuni um hendi.

Hann/hon verður skrivari hjá ráðnum, skal røkja samskiftið millum ráðið og aðrar stovnar bæði innan- og uttanlands; skal saman við ráðnum leggja til rættis og útinna verkætlanir á fyribyrgingarøkinum.

Skrivstovan skal m.a. fáa til vega og greina (tilreiða) hagtøl til tess at lýsa støðuna á fyribyrgingarøkinum.

Umframt at luttaka aktivt á einum ella fleiri serøkjum innan fyribyrging, skal viðkomandi røkja dagliga samskiftið við teir ráðgevar, sum verða settir at loysa serligar uppgávur.

**Vit søknast eftir fólki, sum uppfyllir hesi krøv í so stóran mun sum gjørligt:**
Tú skalt hava áhuga og ágrýtni at arbeiða við fyribyrging á einum breiðum grundarlagi.
Um tú hevur eina hægri útbúgving innan samfelagsviðurskifti/heilsuviðurskifti, verður tað roknað sum ein fyrimunur.

Royndir innan fyribyrgingararbeiði ella praktiskar royndir við verkætlanum á heilsu/ fyribyrgingarøkinum verða eisini roknaðar sum ein kvalifiserandi førleiki.

Førleiki í at nýta teldu til vanligar skrivstovuuppgávur íroknað T-post samskifti er eisini ein fyrimunur.

**Um okkum:**
Fyribyrgingarráðið er eitt ráð við 7 limum, sett sambært løgtingslóg. Limirnir eru fakfólk innan økir við tilknýti til heilsu- og ella fyribyrging.
Ráðið virkar undir landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum og hevur sambært lógina m.a. til uppgávu at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum um fyribyrging, at styrkja heilsufremjandi og fyribyrgjandi tiltøk, at taka stig til kanningar og útgreiningar á økinum og at stimbra gransking og royndum á økinum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður løntsambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarmyndugleikin er Almanna- og heilsumálaráðið, sum setir í starv eftir tilmæli frá Fyribyrgingarráðnum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Pál Weihe, formann í fyribyrgingarráðnum, tlf. 316696 ella 216696 ella við telduposti til pal@health.fo

Lógin um Fyribyrgingaráð og viðmerkingar kunnu heintast á heimasíðu Føroya Løgtings.
http://www.logting.fo/

Umsókn við avriti av prógvum skal sendast til:
Fyribyrgingarráðið
J. C. Svabosgøta 6,
Postsmoga 135,
FO-110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 19. februar 2007 kl. 12.00

J. C. Svabosgøta 6, Postsmoga 135, FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 31 51 55, Fax: +298 32 02 72
Heimasíða: www.fyribyrg.fo, T-postur: fyribyrg@fyribyrg.fo

---

KRINGVARP FØROYA

# MÓTTØKA

Týsdagin 6. februar verður Kringvarp Føroya 50 ár.

Henda dagin bjóða vit til almenna móttøku í kringvarpshúsinum í Sortudíki frá kl. 15.00 til 17.00.

**Øll eru vælkomin.**

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur
Postboks 1299 FO-110 Tórshavn
Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01
www.kringvarp.fo

REPROZ

---

STARVSLÝSING

# Verkfrøðingar til Landsverk [endurlýsing]

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt á nýggjum eftir tveimum verkfrøðingum – einum til vegadeildina og einum til framleiðsludeildina hjá Landsverki at byrja skjótast til ber. Vit kunnu bjóða spennandi og áhugaverd størv, ið eru fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

## Verkfrøðingur til vegadeildina

### Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
· Planlegging
· Prosjektering
· Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av vega-, brúgva- og tunnilsprosjektum
· Eftirlit við verkætlanum
· Gera ætlanir fyri ferðslutrygdartiltøk
· Myndugleikaumboðan
· Luttaka í norðurlendskum samstarvi innan økið

### Førleikakrøv
Vegadeildin søknast eftir verkfrøðingi við royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Royndir at arbeiða við KT-forritum á brúkarastøði er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist. Viðkomandi skal eisini kunna røkja aðrar uppgávur á stovninum, enn tær omanfyri nevndu.

## Verkfrøðingur til framleiðsludeildina

### Arbeiðsuppgávur
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
· Yvirskipaða raksturin av skervverkunum saman við formonnunum á verkunum kring landið.
· At skipa fyri viðlíkahaldi og dagføring av verkunum kring landið.
· Gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og verklagsarbeiðum.

### Førleikakrøv
Framleiðsludeildin søknast eftir einum fólki við útbúgving sum verkfrøðingur ella aðrari viðkomandi útbúgving. Viðkomandi skal hava áhuga at arbeiða við KT. Royndir við at arbeiða við Excell-rokniarki og Word er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist.

### Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
FO–110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. februar 2007. Merk umsóknina „Verkfrøðingur til vegadeildina“ ella „Verkfrøðingur til framleiðsludeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið á vegadeildini kunnu fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, deildarleiðara, á fartel. 540 881 ella teldupost he@lv.fo

Nærri upplýsingar um starvið á framleiðsludeildini kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á fartel. 540 841 ella teldupost to@lv.fo

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur, byggiharrauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK
byggir land

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo